

*Jógvan S. Jacobsen starvast sum innkeypari á Vónini. Hann hevur eisini sína føstu gongd til andalig tiltøk samkomuni Siloa í Fuglafirði, men hugsar eisini um onnur. Hann er tí altíð við, tá andaktir verða hildnar á arbeiðsplássi hansara*

# Geva afturljóð í hjartanum

Andaktirnar á Vónini vara vanliga einar 10 minuttir og eru rættiliga fjølbroyttar í innihaldi:

Onkur lesur upp eina andakt sum hoyrir til dagin, meðan onkur annar velur at lesa úr Bíbliuni og hugleiðir so um tey. Ofta verða tikin fram evni sum hava við havið og sjólívið at gera - ein boðskapur sum gevur afturljóð í hjørtunum á mongum teirra, sum hava við sjógvin at gera.

Andaktin endar við eini stuttari bøn, har ein leggur land og fólk og virkið í Harrans hendur.

At fólkini á virkinum er fegin um hesar andaktirnar kann Jógvan bara staðfesta: Um andakt ikki hevur verið eina viku av einihvørjari orsøk, so fær Jógvan beinanvegin spurningar um hví tað er so.

– Hetta vísir best, at fólk eru sera positivt innstillað til hesar andaktirnar, sigur Jógvan.

# tað?

vera?« Men aðrir spottaðu og søgdu: »Teir eru druknir av søtum víni.«".

Navnið hvítusunna kemur av, at í fornkirkjuni var hetta dópstíðin fram um aðrar, og kemur av teimum hvítu klæðunum, sum tey doyptu vóru í. Navnið "hvítusunna" vinnur sær rætt í gomlu ensku kirkjuni, og haðani kemur tað til Noregs, Føroyar og Ísland.

Men tað navnið, sum annars vann fram í flestu europeisku londunum var orðið, sum t.d. á donskum er "pinse". Tað kemur av grikska orðinum "pentekoste", ið merkir 50. dagurin eftir páskir.

Høgtíðin, sum ápostlarnir komu saman á, var annars gomul jødisk takkarveitsla fyri hveitiskurðin. Men í kristnu kirkjuni fær høgtíðin so ein annan dám og týdning. Tað er annars ikki so langt síðani, at tú í Føroyum kundi hoyra fólk ynskja "gleðiliga pinsafest", men tað man ikki hoyrast longur.

Føroyska navnið á høgtíðini hevur so altíð verið hvítusunna.




## STUTT SAGT

# Fjølbroyttar gudstænastur

**Klaksvík:** Hvítusunnan er ein av teimum trimum stóru kristnu høgtíðunum, og í kirkjunum kring landið verða tí hópin av gudstænastum um vikuskiftið.

Her er talan um vanligar gudstænastur, men eisini gudstænastur, har okkurt serligt verður gjørt burturúr.

Nevnast kann, at 2. hvítusunnudag kl. 15 verður ein barnagudstænasta við Hans Eiler Hammer í Christianskirkjuni og um kvøldið kl. 20 konsert við Havnarkórinum.

Henda dagin verður eisini ein deyvagudstænasta í Vestmanna kirkju kl. 11 við Jónsveini Bech presti. Við hesa gudstænastuna, sum sjálvandi eisini er fyri tey hoyrandi, er altargangur, eins og savnað verður inn fyri deyvameinigheitina.

**sb.**



*Bæði barnagudstænasta og konsert verða í Christianskirkjuni hvítusunnudag*

# Vitjan av Suðurafrikanskum talara

**Tvøroyri:** Hesa høgtíðina hava tveir kristnir felagsskapir – kvinnufelagsskapurin Aglow og missiónsfelagsskapurin YWAM (Youth With a Mission) í Føroyum – sligið seg saman um eina møtirøð í Fylking. Talari verður Elisabeth Syré úr Suðurafrika.

Møtini byrja í annaðkvøld kl. 21 og halda síðani fram allar høgtíðsdagarnar.

Leygardag verða møtir kl. 11, 15 og 20 og hvítusunnudag kl. 11 og 17.

**sb.**

# Samfelagsstevna í Suðuroy

**Vágur:** Aftur í ár fara fólk úr Suðuroynni og norðanfjørðs at leita sær til samfelagsstevnuna sum samkoman í Bethel í Vági skipar fyri.

Møtini byrja í annaðkvøld kl. 20, tá bønarmøti verður í Bethel. Leygarmorgunin kl. 10 verður uppbyggingarmøti á sama staði, men síðani fara flestu møtini fram í ítróttarhøllini í Vági.

Í høllini verður fyrsta evangeliska møtið leygarkvøldið kl. 20 og seinni sama kvøld – kl. 22:30 – er opið hús fyri ung í Bethel, sum liggur mitt í býnum.

Hvítusunnudag kl. 10 verður møti við breyðbróting og kl. 16 uppbyggingarmøti. Eftir tað er náttverði á skránni, áðrenn evangeliskt møti verður aftur kl. 19. Seinni um kvøldið verður aftur opið hús í Bethel.

Møtini enda 2. hvítusunnudag við uppbyggingarmøtum kl. 10 og 15 í ítróttarhøllini og evangeliskum møti í Bethel kl. 20.

Talarar ymsastaðni frá fara at luttaka, umframt góðar sangkreftir.

**sb.**



*Samkoman Bethel í Vági skipar fyri stevnu nú um hvítusunnuna*